Hanga í línuni

Teir lata væl at fiskiskapinum. Men høgi me›alaldurin í egningarskúrinum, sigur naka› um framtí›arútlitini hjá línuflotanum. Í egningarskúrinum hjá línuskipinum, Nor›søka á Ei›i, halda teir, at politikararnir fullkomuliga hava slept línuni

Jákup Joensen egnir vanliga einar 7 stampar um dagin. Nor›søki letur 80 krónur fyri stampin og eina eykaløn tá i› 6 eru egndir

Nor›søki FD530

Mynd: Jens K. Vang

- Línubátur, 61,12 BRT
- Bygdur í 1942 úr eik í Holbæk í Danmørk
- Manningartal: 6
- Maskinorka: 370 hk Cummins Diesel
- Eigari: P/F Bakur á Selatra›

Høgni Mohr og Dánjal Højgaard

Uttast vinstrumegin, tá i› tú kemur inn í egningarskúrin, stendur ei›isma›urin, Jákup Joensen, vi› sínum sjeynda stampi. Hann er fyrrverandi rei›ari á Nor›søka, og einasti sosialistur í skúrinum, vilja hinir vera vi›. Her eru sambandsmenninir í meiriluta. Høgna Hoydal er eingin teirra væl í øgn vi›.

Lagi› er gott, og hugurin at egna, ikki verri.

- Torrafiskurin skuldi veri› fyri nú, heldur Jákup, sum hevur betri hug, at tosa um fiskiskap enn um fullveldi. Torri er tí›in, tá i› fiskurin kemur inn á grunnin at g‡ta. Teir gomlu plagdu at siga, at torrafiskur er feitur bæ›i til livur og til kropp.

- Hann plagdi at koma heilt inn undir land. Fyrraári› var so smekkfult. Men ta› hevur vi›ra› so illa í seinastuni, at enn hava vit ongan sæ›, sigur Jákup.

Várró›ur í nánd

Seinastu átta seturnar hevur selatra›arskipi›, Nor›søki, fingi› 64.000 pund. Hetta er millum 150 og 200 pund upp á stampin. Ta› ver›ur hildi› at vera gó›ur fiskiskapur.

Nor›søki heldur til á Ei›i. Har í bygdini eru egningarskúrurin og frystaríi› hjá skipinum.

T‡smorgunin um hálvgum níggju tí›ina kom Nor›søki inn til Ei›is vi› 7.000 pundum. Alt fyri eitt vór›u teir 60 stamparnir ripa›ir upp á bryggjuna, og longu klokkan 16.00 sama dagin skuldi skipi› fara út at seta teir 60 n‡egndu stamparnar. Nor›søki er einasti avbygdabátur, i› egnir á Ei›i.

Í egningarskúrinum á havnalagnum á Ei›i eru 12 mans úr fimm bygdum. Helvtin er ei›ismenn, tríggir av Selatra›, ein úr Tjørnuvík, ein úr Streymnesi og ein frá Ljósáum.

Goggan er gó›

Ein teirra er selatra›arma›urin, Jóhan Karl Djurhuus. Hann er eisini rei›ari á Nor›søka.

Teir eru tríggir selatra›arbrø›ur, sum vóru vi› til at keypa Nor›søka frá ei›ismonnum fyri nøkrum árum sí›ani. Nor›søki hevur kortini framvegis fast tilhald á Ei›i, og einasta sjónliga tekni› um eigaraskifti› er, at nú stendur Selatra› á navnabrettinum.

Jóhan Karl egnir vi› goggu á ø›rum hvørjum húki. Gogguna fiskar hann vi› tíggjumannafari sínum, og hon tænir sínum endamáli.

- Goggan er øgiliga gó› til tann gráa fiskin, sigur hann.

Ongan gó›an

Men hóast lagi› er gott í skúrinum og várró›urin er í nánd, so er kortini eingin várkensla at hóma millum línumenn og búnar egnarar á Ei›i.

Asbjørn Djurhuus, forma›ur í skúrinum, er ikki bjarskygdur, tá tosi› fellur á framtí›ina hjá vinnuni. Hann væntar ikki, at línuvei›uni ver›ur lív laga›.

- Vit, i› royna vi› línu, eiga ongan gó›an millum politikararnar. Me›an teir stóru trolararnir hótta okkara vinnu, latast teir, i› rá›a fyri borgum, ikki um vón, sigur hann.

- Doyr línufiskiskapurin út, so ver›ur egningin heldur ikki at hóra undan, sigur Asbjørn, sum væntar, at saknur ver›ur í serstøku atmosferini í skúrinum, sum hann heldur hava stóran sosialan t‡dning.

Og hugurin at egna er gó›ur.

Hóast teir 60 stamparnir vór›u egndir alt fyri eitt, er ongin vandi fyri, at Nor›søki kemur í uppisetur á Nor›havinum. Í frystibingjuni standa longu 150 stampar klárir, egndir vi› kúfiski, kúvingi og høgguslokki.

Teir gomlu megna enn at halda balans.

HYGG & HOYR

Fríggjadagur 4. februar

Øssur Winthereig, tíðindastjóri Sjónvarp Føroya

Endiliga!

Sjónvarp Føroya hevur nú fingið loyvi at senda íslendsk tíðindi í sendingini »Grannar Okkara«



Hóskvøldið verða íslendsk tíðindi at síggja í sendingini Grannum Okkara. Nú er avtalað við íslendska sjónvarpið, at SvF eina ferð um vikuna fær tíðindi úr Íslandi at brúka eitt nú í sendingini Grannum Okkara.

Tað hevur altíð verið eitt stórt ynski eisini at hava tíðindi úr Íslandi við í sendingini. Íslendska sjónvarpið sendir ikki sínar sendingar um fylgisvein, tí hevur ikki borið til hjá SvF at taka tilfar beinleiðis niður úr luftini. Tað hevur borið til við norsku, donsku og svensku tíðindunum, tí har verða vanligu sendingarnar sendar um fylgisvein.

Nýggja avtalan við íslenska sjónvarpið er komin í lag, tí íslendska sjónvarpið í øðrum sambandi sendur tíðindi til hini norðurlond. Sjónvarp Føroya er nú komið við í hetta samstarv og vóna vit, at hetta kemur í ein trygga legu.

Í fyrsta lagi verða íslendsku tíðindini ikki týdd til føroyskt.

ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, skrivar

Meira fyri oyruni

Sjálvur var eg í síni tíð ivasamur, um tað var beint at avtaka fjølmiðlamonopolið og sleppa hvørjum Hanusi og Janusi framat slíkum virksamum ávirkanarkeldum.

Við bert einum eygum og oyrum at gloypa við kann tað fyri einstaklingin skjótt gerast ov mikið av tí góða, stjelur tíð, umframt at samfelagið er fáment, lurtaraskarin avmarkaður, og vit kunnu nú einaferð ikki øll vera í tænastuvinnuni.

Men tað nyttar ikki at andøva ímóti menningini og nýtist ikki at vera mannminkandi at broyta meining og hugburð. Og tað havi eg so gjørt hendan mánaðin, síðani vit hava fingið heilar tvær útvarpsrásir aftrat.

Rás 2 hevur aftaná stutta tíð longu fingið fulla, fasta dags- og vikuskrá, sum eftir umstøðunum og orkuni er rímiliga fjølbroytt og viðkomandi, hóast tað enn er ríkiligt av berum musikki.

Tíðindi og onnur viðkomandi samfelagslig kunning eru nakað øðrvísi enn í ÚF og á sín hátt forkunnug og professionelt framborin.

Telefonprátini við sjófólk okkara á nær- og fjarleiðum eru væl eydnað, og tað er ikki uttan týdning, at verturin dugir so væl at samskifta við sjómenninar.

Skemtisendingarnar, Flenn Bara, hava higartil verið beinleiðis framúr. Í nýggju rásini eru øðrvísi møti, øðrvísi musikkur og meira fyri ungdómin, jú, har á Rás 2 er nakað fyri ein og hvønn, og so er alt enntá ókeypis fyri lurtaran. Ótrúligt um hetta fer at bera til í longdini, og um ikki, so er tað ikki verri enn so, at tað frammanundan lurtarafíggjaða ÚF frameftir kann taka til sín nøkur av góðu hugskotunum og áræðinum, sum longu er komið til sjóndar á Rás 2.

Viðvíkjandi hini nýggju rásini, Lindini, so er enn ov stutt fráliðið, til at hon kann vera komin rættiliga fyri seg viðvíkjandi skrá, vavi og fjølbroytni, men tað kann væl koma, sum frálíður.

Annars hava gomlu loftmiðlarnir eisini verið fjølbroyttir og áhugaverdir farnu vikuna.

ÚF sýnir framvegis hegni at fáa friðarfólk at fortelja, og í so máta verður Janus í Bindibókini sum sunnudagsgestur neyvan tikin.

Lívgandi var eisini at hoyra Magnus Dam í vikuskiftissending práta við tey av Kamarinum og Julionnudrongin, hesi lítiðlátnu, trúgvu og drúgvu tónleikafólkini.

Og millum mangt annað fylgdi eg eisini væl við Vaglinum, har evnið var teldunýtsla til gamans og sum dagdvølja, síðani eg sum virkandi sálarfrøðingur stúri fyri, at hetta frálíka tól, sum so mangt annað, eisini kann misnýtast ella fáa ov mikið vald á fólki, tí í so mátta gongur sjón fyri søgn í londunum rundanum okkum, har neyðugt hevur verið at reisa serligar avvenjingarstovnar fyri spæl- og teldubundin fólk, og í so máta plaga føroyingar ikki at liggja aftanfyri nakran.

Í Sjónvarpinum vóru Innskotini við Olsen og Planck hvør í sínum lagi frálík. Og so ikki at forgloyma útoyggjasendingarnar hjá presti. Spell at frálíku evni Ólavs at koma í samband við fremmandafólk nústani koma reiðiliga til sjóndar í SVF, nú hann gevst har, men tað fer so at koma hvalbingum og sandvíkingum til góða.

Trongisvágsbóndin í Bestubitum var lívgandi at skoða og líða á fyri okkum onnur meira dapurskygdu.

Annars hevur SVF hildið áfram við sínum frálíku útlendsku raðsendingum, spennandi filmum og sum nakað serliga forkunnugt borðreiddi SVF nærmast kvøld um kvøld við heilum tvinnum annars bannaðum filmum (Life og Brian of Blikktrummuni).

Tíðin gongur, broytist og so við almennum hugburði og erkvisni.

Mær tykir, at tað var líka so beint av SVF at senda hesar filmar, nú hyggjaraskarin umsíðir er vorðin meira vanur og harðbalin, sum tað var beint av mær og øðrum í tí almenna filmseftirlitinum vegna Føroya fólk at banna hesar filmar í síni tíð fyri umleið 20 árum síðani, tá mong fólk firnaðust sjálvt tann ferðandi Geytan við ljósbíløtum.

Og tó er lógargrundarlagið í dag hitt sama sum tá! Snedugt ha? Jú, so er, og sig so ikki at mangt er forborgið í Føroyum.

Samanumtikið ein forvitnislig farin loftmiðlavika, sum setti krøv til bæði skráir, stundir og okkurt at zappa við.

ÚTsjón Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN